## Nú byrja samráðingarnar

John Johannessen
Úr Keypmannahavn

**Mikudagur, kl 13:49:** Klokkan eitt kom løgmaður við fylgi av landsstýrisfólkum og embætisfólkum í danska forsætismálaráðið, har onnur runda av ríkisrættarligu samráðingunum í dag fara fram.

Áðrenn fundin beyð danski forsætisráðharrin føroyingunum til frokost, eins og við fyrstu rundu.

Báðir partar sita enn við frokostborðið, men væntandi byrja veruligu samráðingarnar inni í eikitræðssalinum um eina lítla løtu.

Samráðingarnar skulu vara til klokkan níggju í kvøld, danska tíð, og verður tíðindafundur hildin klokkan eitt korter til tíggju í speglsalinum.

## Samráðingarnar ganga væl

**Mikudagur, Kl 15:58:** Fyri løtu síðani frættist úr eikitræssaðlinum, at tíðarætlanin fyri samráðingarnar fer at halda

Væntandi verður annar samráðingarfundurin millum landsstýrið og donsku stjórnina í eikitræðssalinum í danska forsætismálaráðnum liðugur klokkan níggju í kvøld, eins og ætlað.

Fyri løtu síðani frættist úr samráðingarhølunum, at samráðingarandin er góður og samráðingarnar ganga væl. Tí stendur ætlanin við um at halda tíðindafund eitt sindur yvir klokkan níggju.

## Smálutirnir skulu viðgerast

**Mikudagur, kl. 17:41:** Løgmaður gjørdi áðrenn samráðingarfundin í dag greitt, at hann á hesum fundinum vil hava donsku stjórnina at svara sær, um hon er sinnað at samráðast um sokallaðan frælsan felagsskap millum Føroyar og Danmark.

en danska stjórin ætlar sær ikki at geva nakað greitt svar, fyrr enn hon væl og virðiliga hevur viðgjørt hesa ætlan í smálutum. Hetta gjørdi Jan Petersen, framsøgumaður í Føroyamálum hjá danska Javnaðarflokkinum, fyri lítlari løtu síðani greitt, tá vit hittu hann úti á ganginum í forsætismálaráðnum.

Jan Petersen er sjálvur limur í 21 manna nevndini, ið er sett at fylgja og ráðgeva stjórnini undir samráðingunum við føroyingar. Tí hevur hann undan samráðingunum verið á fundi við donsku stjórina fríggjadagin, tá stjórnin ráðførdi seg við nevndina undan samráðingarfundinum.

Á hesum fundi varð spurningurin um frælsan felagsskap viðgjørdur, og vil stjórnin ikki taka nakra greiða støðu til spurningin, fyrr enn hann er viðgjørdur væl og virðiliga. Kortini væntar Jan Petersen ikki, at hetta fer at darva samráðingum.

## Samráðingarnar eru lidnar

**Mikudagur, kl. 19:30:** Annar samráðingarfundurin millum landsstýrið og donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya er av

Samráðingarfundurin millum landsstýrið og donsku stjórnina er júst av, og um eina løtu verður tíðindafundur hildin í speglsalinum í danska forsætisráðnum.

Sum skilst, hevur samráðingarandin verið góður, og partarnir hava fingið avkláðað ein part av tí, teir høvdu sett sær fyri undan samráðingunum.

## Framvegis ósemja um skiftistíðina

**Mikudagur, kl. 21:34:** Samráðingarfundurin á Christiansborg er liðugur. Partarnir eru samdir um sjey punkt, m. a. um ríkisrættindini

Men partarnir eru framvegis ósamdir um skiftistíðina. Forsætisráðharrin stendur fast við eina stutta skiftistíð. Hesaferð sigur hann, at talan verður um eina skiftistíð upp á fýra ár soleiðis, at stuðulin lækkar 20% um árið í fýra ár.

# Andstøðan: Fullveldið fer at kosta nógv

*Stóru andstøðuflokkarnir halda, at fólkið verður stóri taparin, um Føroyar taka fullveldi við nøkrum, sum líkist aktuellu samráðingarstøðuni*

Dagfinn Olsen og
Eyðun Klakstein

Formenninir í stóru andstøðuflokkunum halda, at samráðingarúrslitið hjá landsstýrinum higartil er vánaligt, og fer endaliga úrslitið bara at líkjast støðuni í dag, fer tað at hava álvarsligar avleiðingar við sær fyri føroyska samfelagið.

– Samráðingarnar eru ein vanlukka fyri tey, sum hava sett sínar vónir til, at landsstýrið fór at fáa okkurt burtur úr, sigur Edmund Joensen, formaður í Sambandsflokkinum.

– Tað er fullkomiliga greitt, at verður úrslitið av samráðingunum nakað, sum líkist støðuni í løtuni, so verður tað eitt stórt bakkast fyri føroyska samfelagið. Vit koma at uppliva fólkaflyting, stóra afturgongd í búskapinum og munandi lækking í livistøðinum, sigur hann.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, metir, at talan var um ein løgnan tíðindafund eftir samráðingarumfarið týsdagin.

- Føroyingar tóktust glaðir, men tað er løgið, tí hyggur ein eftir tí, ið kom burturúr, so er tað sera soltið, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Tá landsstýrið førir fram, at partarnir bert eru ósamdir um búskaparliga partin, so er tað ikki rætt, tí tað er frá danskari síðu ein røð av fyrivarnum allan vegin ígjøgnum, sigur Jóannes Eidesgaard, ið eisini heldur, at tá løgmaður og Helena Dam á Neystabø eru farin at práta um at útseta hetta við at seta fullveldið í gildi, so kann tað vera tekin um, at tey eru farin at ivast í síni søk.

### Fær álvarsligar fylgjur

Edmund Joensen heldur, at loysingin fer at kosta nógv.

– Samráðingarúrslitið higartil er langt frá tí, sum landsstýrið segði, at tað fór at fáa burtur úr. Landsstýrið segði, at føroyska samfelagið kundi halda fram uttan nakrar broytingar eftir eina loysing, men nú hava vit enn einaferð fingið staðfest, at fullveldið fer at hava álvarsligar fylgjur við sær.

– Landsstýrið má koma heim og viðganga, at politikkurin hjá teimum er óforsvarligur, og so má landsstýrið fara frá, so onnur kunnu koma til.

Jóannes Eidesgaard leggur dent á, at Javnaðarflokkurin er ímóti upplegginum hjá landsstýrinum, tí við hesum missir Føroya fólk nakrar møguleikar og nøkur rættindi. Hann heldur, at einki bendir á, at danska stjórnin er til at vika viðvíkjandi skiftistíðini, har stjórnin eisini fekk fullan stuðul í Fólkatinginum.

Eisini er formaður Javnaðarfloksins ivaleysur í, at hetta merkir, at føroyski búskapurin má umleggjast og broytast, og at taparin verður vanligi lønmóttakarin.

### Fáa stættarmun

Jóannes Eidesgaard metir ikki fyribilsúrslitini av samráðingunum millum Føroyar og Danmark boða frá góðum.

- Við hesum missa føroyingar øll rættindi. Tey, ið koma úr familjum við smáum korum, hava havt møguleika at fáa sær útbúgving ókeypis í donskum skúlum, umframt at fáa stuðul av ymsum slag. Alt hetta hvørvur, umframt onnur rættindi og fyrimunir, ið eru av ómetaligum týdningi fyri eina lítla tjóð, sigur Jóannes Eidesgaard.

- Nú skulu vit sammetast við onnur Norðurlond, tá talan er um samstarv við Danmark. Ísland hevur í dag eina seravtalu um fría atgongd til danskar skúlar, men pening skal ein hóast alt hava við heimanífrá, sigur formaður Javnaðarfloksins.

Han heldur, at hetta kann koma at merkja, at bert børnini hjá vælbjargaðum foreldrum hava møguleika at fara undir útbúgving, tí foreldrini eisini mugu spýta í.

- Vandi er fyri einum samfelag við stættarmuni, metir formaður Javnaðarfloksins.

# Landsstýrið krevur upplýsingar um radarstøðina

*Landsstýrið vil hava at vita frá donsku stjórnini, hvussu eigaraviðurskiftini av radarstøðini á Sornfelli*

Eyðun Klakstein

Landsstýrið krevur nú at fáa allar upplýsingar um radarstøðina, sum danir hava í Føroyum.

Á samráðingarfundinum í Keypmannahavn týsdagin bað landsstýrið donsku stjórnina svara sær spurningum um radarstøðina á Sornfelli.

Landsstýrið vil hava at vita, hvør tað er sum fíggjar radarstøðina, hvussu eigaraviðurskiftini eru og um danska stjórnin hevur gjørt sær tankar um, hvussu støðin skal rekast, tá Føroyar fáa fullveldið.

Harafturat spyr landsstýrið, um tað kann fáa øll skjøl, sum snúgva seg um radarstøðina.

Landsstýrið vil hava greiði á hesum viðurskiftum fyri at fáa eina realistiska mynd av støðuni, verður sagt. Hesar upplýsingar vil landsstýrið hava fyri at rætta avgerðina kann takast um framtíðina hjá støðini.

### Umhugsa limaskap í NATO

Landsstýrið sigur í einum uppleggi til fundin, at einar sjálvstøðugar Føroyar fara at vísa ábyrgd á trygdarpolitiska umráðinum.

Føroyar fara at samstarva við grannarnar um trygdar- og verjupolitikk, og Føroyar ætla at lata sítt ískoyti til at varðveita stabilitetin í norðuratlantshavi.

Landsstýrið umhugsar at søkja um limaskap í felagsskapinum *Partnership for Peace,* sum er ein nýggjur trygdar- og verjupolitiskur felagsskapur hjá NATO.

Í løtuni er tað Danmark, sum avgerð trygdar- og verjupolitikkin hjá Føroyum. Landsstýrið heldur, at ein avleiðing av hesum er, at Føroyar hava ikki fingið nøktandi innlit í tað, sum er farið fram í og kring Føroyar, tá talan er um hernaðarmál.

Tí krevur landsstýrið nú, at danska stjórnin leggur øll kortini um radarstøðina í Føroyum á borðið.



*Landsstýrið krevur nú at fáa allar upplýsingar um radarstøðina á Sornfelli*



# Stingið í sekkin

*- Um Høgni Hoydal er farin at práta um at yvirtaka stig fyri stig, so er hann ikki mentur at halda gomlu kós Tjóðveldisfloksins, men hevur lagt seg uppat tí, ið Sjálvstýrisflokkurin og aðrir flokkar hava staðið fyri. Um hetta er støðan, so vænti eg at tey koma heim og leggja kongin, sigur Jóannes Eidesgaard*

Dagfinn Olsen

Høgni Hoydal vísir í blaðnum í dag á, at ein møguleiki, ið landsstýrið metir verða gongda leið, er at seta nýggja ríkissáttmálan í gildi í stigum. Heta merkir, at fullveldismálið er ikki avgreitt, fyrr enn um 15 ár.

Formaðurin fyri annan av stóru andstøðuflokkunum, Javnaðarflokkinum, sigur, at um so er, so eiga samráðingarfólkini at stinga í sekkin og koma heim.

- Um Høgni Hoydal er farin at tosa um at taka yvir í stigum, so haldi eg at Tjóðveldisflokkurin skal stinga í sekkin og siga, at teir koma ikki á mál í sínum ætlanum. Tað var ongantíð stig fyri stig politikkur, ið eyðkendi Tjóðveldisflokkin, men heldur hinar flokkarnar, meðan Tjóðveldisflokkurin stóð á síðulinjuni og rópti um loysing her og nú, sigur formaður Javnaðarfloksins.

### Leggja kongin

- Um Høgni Hoydal nú tosar um stig fyri stig, so má eg staðfesta, at nýggi formaðurin í Tjóðveldisflokkinum er ikki mentur at at halda fast við gomlu stevnu floksins, men heldur er farin yvir í stevnuskránna hjá Sjálvstýrisflokkinum og øðrum flokkum. Um hetta er støðan, so rokni eg við, at teir koma heim og leggja kongin, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Ikki sambandflokkur

Uppá spurningin, hvørt Javnaðarflokkurin ikki er bangin fyri, at fólk eru farin at hava ilt við at síggja mun á Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum, sigur Jóannes Eidesgaard, at sjálvsagt duga tey í flokkinum at síggja henda vanda. Men hann leggur dent á, at flokkarnir eru als ikki líkir, tó teir hava kunnað samstarvað í andstøðuni..

- Vit hava altíð verið ein progresivur flokkur í føroyskum politikki. Vit ganga inn fyri broytingum og at vit gerast sjálvbjargin politiskt og fíggjarliga. Men tað nyttar ikki at leypa nøkur lið um í hesi gongdini. Fullveldisætlanin fer eftir úrslitinum og so má arbeiðið gerast aftaná. Vit siga, at vit mugu gera arbeiðið fyrst, fyri síðan at síggja, hvat tað kann føra til og hvat vit megna. Vit kunnu ikki leypa á bláman, men hetta má gerast við skili, sigur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard.



*Jóannes Eidesgaard metir, at um nýggi formaðurin í Tjóðveldisflokkinum er farin at tosa um yvirtøku stig fyri stig, so er hann gingin burtur frá gomlu stevnu floksins, og eigur at koma heimaftru og leggja kongin*

# Amariel í 20 ár á Gallarí St. Gertrud

*Eigarin av Gallarí St. Gertrud hitti Amariel Norðoy, tá hesin gekk á Kunstakademiet. Hetta varð byrjanin til samstarv, ið nú hevur staðið við í 20 ár*



Í 20 ár hevur føroyski listamaðurin Amariel Norðoy samstarvað við Gallarí S.t Gertrud í Keypmannahavn. Líka nógvar framsýningar hevur hann havt har hesi árini, har tað er vorðin siður, at hava eina framsýning við Norðoy hvørt ár í maj.

Hetta 20 ár langa samstarv verður hildið við framsýning frá 6. til 26. maj, har altjóða kendi Karsten Vogel fer at leika saman við sínum tónleikarum, umframt, at Annika Hoydal eisini luttekur.

*- do -*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Ung list í Smiðjuni

Í hesum døgum sýnir ungur listamaður fram í Smiðjuni í Lítluvík í Havn.

Tað er 24 ára gamli Harry Knudsen úr Runavík, ið sýnir fram 16 oljumálningar. Myndevnini eru landsløg og okkurt bygdarlag.

Hetta er fyrstu ferð, Harry sýnir fram, tí hann hevur ikki málað so longi. Hann er tó glaður fyri sítt frítíðarítriv. Við framsýningini ger hann eina roynd at vita, hvat fólk halda um málningarnar, og um vert er at halda fram við penslinum.

Eftir summarfrítiðina skal Harry til Danmarkar í skúla, men hann vónar at fáa stundir at halda fram við listini og at menna hesa framyvir.

Opið er í Smiðjuni frá 1. maj til 4. maj frá klokkan 16 til 20.



*Harry Knudsen sýnir fram í Smiðjuni í hesum døgum Mynd: Jens K. Vang*

TILBOÐ
FRÁ JUNGMANN
HESA VIKUNA

Sosialurin - 311820



Vit lata
kr. 500,-
fyri tín gamla
klædning
við keypi av
einum nýggjum

Leygardagin
er opið til kl. 17.00

JUNGMANN
Saltangará • Heiðavegur • Tel. 448110